## Helst afturvaldur

Alt bendir á, at forsetin í Sri Lanka, Mahinda Rajapaksa, kann halda fram í embætinum aftan á forsetavalið í gjár. Í morgun høvdu valmyndugleikarnir talt umleið ein fjórðing av atkvøðunum, og av teimum átti forsetin meiri enn 60 prosent, skrivar Reuters. Hansara harðasti mótstøðumaður, generalurin Sarath Fonseka, ber ótta fyri at verða handtikin, tí hermenn hava kringsett hotellið, har hann og fleiri onnur andstøðufólk eru stødd. Myndugleikarnir siga harafturímóti, at herurin hevur kringsett hotellið fyri at forða fyri, at generalurin, sum júst er farin úr herinum, skal fremja statskvett ímóti forsetanum.



## Skot við Koreanesið

Norðurkoreanskar kanónir skutu í nátt eftir einari oyggj í Gula Havinum, sum er undir suðurkoreonskum ræði. Suðurkoreanski herflotin svaraði aftur, men sambært tíðindastovunum varð eingin raktur, og tað er heldur ikki frætt um materiellan skaða. Kortini hevur suðurkoreanskir forsetin boðsent sínum ráðgevum til fundar at umrøða tilburðin. Tey bæði londini eru ósamd um markið í Gula Havinum, og bæði í 1999 og í 2002 vóru samanbrestir millum herskip hjá londunum. Fyri tveimum mánaðum síðani fór eitt norðurkoreanskt herskip um markið, sum ST hevur ásett.

# Bátafelagið vil framvegis byggja nýtt



*Verandi bygningur hjá Tórshavnar Bátafelag undir Bryggjubakka skal rívast niður og nýggjur bygningur í fýra hæddum byggjast í staðin* *Savnsmynd*

**Hóast verri tíðir arbeiðir Tórshavnar Bátafelag framvegis við ætlanunum at byggja ein nýggjan bygning undir Bryggjubakka. – Tað er við at koma undir land nú, sigur Kartni Olsen, formaður**

BYGGING

*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Nýggjan bygning í fýra hæddum við skrivstovu, skeiðshølum og einari møguligari írskari pubb á niðastu hædd. Tað er ætlanin hjá Tórshavnar Bátafelag, sum framvegis arbeiðir víðari við ætlanini at byggja felagnum nýggj høli á staðnum, har verandi høli standa undir Bryggjubakka.

Ætlanin var at fáa nakrar av seinastu snøklunum upp í pláss í gjárkvøldið, tá fundur skuldi vera í Bátafelagnum, men orsakað av ringa veðrinum var ein av nevndarlimunum veðurfastur í Skopun og tí ikki fekk komið á fund.

Men hóast hesir seinastu snøklarnir ikki eru avgreiddir enn, kundi Kartni Olsen, sum er formaður í Tórshavnar Bátafelag, greiða frá, at arbeitt verður framvegis av øllum alvi við at fáa byggingina í gongd.

– Jú, vit ætla at byggja, tað er sikkurt. Vit hava fingið byggiloyvi og hava tekningarnar. Men tað eru framvegis onkur ting, vit mugu fáa upp á pláss, millum annað eina endaliga kostnaðarmeting og at fáa figgingina upp á pláss, greiðir Kartni Olsen frá.

### Upp í 4 hæddir

Sambært Kartna Olsen er ætlanin at byggja ein nýggjan bygning í fýra hæddum á staðnum, har tann verandi á 2 hæddir stendur.

Men tað verður ikki Bátafelagið einsamalt, sum fer at húsast í bygninginum, um alt vil væl við.

– Vit ætla at brúka 2 hæddir sjálvir. Tað verður til undirvísing av ymiskum slag, trygdarskeið, í navigatión og í motorpassarii og so framvegis, sigur formaðurin.

Hinar báðar hæddirnar er ætlanin at leiga út, og hava vit á Sosialinum áður nevnt, at írski hotelstjórin John Coyle úr Galway og tveir aðrir írar hava verið í Føroyum og kannað umstøðurnar fyri at lata eina írska pub upp. Ítøkiliga vóru teir sera áhugaður í at lata upp í nýggja bygninginum hjá Bátafelagnum, tá hann kemur upp, og er tann ætlanin, sambært Kartna Olsen, ikki dottin niðurfyri.

– Jú vit hava samband við teir enn, og teir virka enn sum at teir eru seriøsir, staðfestir Kartni Olsen.

Tekningina til nýggja bygningin hevur Gunnar Hoydal teknað, og hon verður fyrst avdúkað tá byggingin er endaliga samtykt.

Nú verður arbeitt við at fáa eina nýggjan fund í lag, soleiðis at teir seinastu snøklarnir kunnu fáast upp á pláss og verkætlanin kann setast í verk.


## Starvsfólk søkist

Sp/f Búgv og Smúkkuhjørnið søkja eftir fólki, ið kunnu átaka sær tænastu av kundum okkara, passa handilin og skrivstovuna.

Arbeiðstíðin er umleið 20-30 tímar um vikuna.

Gerandisdagar frá kl. 13.30 til 17.30 og leygardagar frá 10.00 til 14.00

**Vit vænta**

- at tú hevur teldukunnleika á brúkarastøði
- at tú dugir væl at skriva føroyskt og skilur enskt
- at tú setur kundatænastuna hægst
- at tú ert fyrikomandi
- at tú ert til reiðar at taka eyka tøk, tá á stendur
- at tú hevur royndir innan handilsvirksemi
- at tú hevur kunnleika til bókhald

Hevur hetta tín áhuga, vilja vit fegin frætta frá tær.

Send umsókn saman við møguligum viðmælum til:

Smúkkuhjørnið
J.C. Svabos gøta 12
FO-100 Tórshavn

Annars fæst meira at vita um starvið á tlf. 21 33 03


# Alt brann innan úr húsunum

**Eini hús á Norðoyri fóru so illa av eldi seinastu nátt, at tey mugu takast niður**

ELDUR

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Ein maður, sum lá og svav á loftinum í húsunum sínum á Norðoyri, vaknaðu um eitt tíðina seinastu nátt, tí hann hoyrdi eitt brak úr neðra.

Hann fór á føtur og sá tá, at roykur kom upp gjøgnum trappurnar.

Maðurin, sum var einsamallur í húsunum, kreyp út gjøgnum vindeygað út á eitt hálvtak og slapp haðani niður at boða frá.

Hann fekk ongan skaða.

Sløkkiliðið var har beinanvegin og fekk sløkt, men húsini fóru heilt illa. Alt brann innan úr húsunum, sum mugu takast niður.

Húsini vóru eini eldri tumburhús á laðari grund.




Altíð tað nýggjasta

www.sosialurin.fo


## Rætting

Í gjár skrivaði undirritaði um kollvelting í matstovuvinnuni í Tórshavn, og av misgávum varð nýggja matstovan Etika ikki við í yvirlitið. Eftir at Gallarí Jinx á Áarvegnum lat aftur yvirtók Hotel Føroyar samtakið bygningin og fór undir fyrstu sushibarrina í landinum, sum kallast Etika. Etika hoyrir undir tær meira eksklusivu matstovurnar í landinum, og verður konseptið fyrsta dagin eisini tikið í nýtslu í hjartanum í Keypmannahavn, har enn ein Etika sushibarr fer at lata upp.

**- rn**